## Fótbólt og konsert fyri Pakistan

**Leygardagin 27. august verða tvey tiltøk, sum bæði hava til endamáls at veita pening til ein bíbliuskúla í asiatiska landinum Pakistan. - Ætlanin er, at hesin skúlin skal byrja longu komandi summar, upplýsir kristni felagsskapurin, Samverkamenn**

Í fyrsta umfari verður talan um eina fótbóltskapping, bæði fyri kvinnur og menn. Her verða serliga reglur galdandi, sum ein vanliga ikki hevur í øðrum fótbóltskappingum.

Hetta verður broytt til somu reglur, sum nýttar verða í t.d. leguhúsinum Zarepta í Vatnsoyrum, har ein verður vístur út í tveir minuttir um ein bannar. Verður bólturin skotin upp undir loftið so verður viðkomandi spælari vístur út í ein minutt.

Vinnandi liðini fáa vinningar frá bókahandlinum Logos í Havn.

Tá ein nú kortini hevur leigað Ítróttarhøllina á Hálsi, so verður í sama umfari skipað fyri eini stuðulskonsert sama kvøld.

Henda konsertin er eisini til frama fyri áðurnevnda bíbliuskúla – ella lærusveinaskúla - í Pakistan.

Luttakandi bólkar á konsertini verða Heini Lützen, Salt og Maria Anderssen.

Eisini koma Niklái og Absalon ein túr á gólvið.

Tað er ókeypis atgongd til konsertina, men inni í sjálvari høllini verður møguligt at lata eina peningarliga gávu til hetta arbeiðið.

Í Pakistan er ætlanin at fáa einar 30 kvinnur og menn at koma saman til undirvísing. Málið er at kunna geva teimum undirvísing í tríggjar mánaðir árliga.

Ætlanin er at leiga eini leguhús, har hesir ungu og virknu pakistanarnir kunnu fáa eina góða og viðkomandi bíbliuundirvísing. Við hesum verður so miðað eftir, at hesi sjálvi kunnu fara aftur í samkomur sínar at undirvísa í Guds Orði. Mett verður at tað eru einar 2 mió. kristin í hesum muslimska landi.

*sb.*

## Sjúkradagar hjá børnum kunnu fækkast

**Vikuskiftið 26. og 27. september verður eitt gylt høvi hjá starvsfólkum á barnaansingarøkinum at sleppa á skeið um vælveruna hjá børnunum, sum tey eru um**

Skeiðið er eitt úrslit av menningardegnum, sum Føroya Tele og Suðuroyar Sparikassi skipaðu fyri í Øravík fyrr í summar.

Út frá hesum er nú ein bólkur skipaður, sum er farin í gongd við at fyrireika enn eitt skeið í Suðuroynni.

Skeiðini fara í størstan mun at snúgva seg um heilsu og vælveru.

- Arbeiði er nú komið so væl áleiðis, at ætlanin er at hava fyrsta skeiðið vikuskiftið 26. og 27. september, sigur ein av stigtakarunum, Sirið Stenberg, heilsufrøðingur.

Fyrsta skeiðið verður fyri starvsfólk á barnaansingarøkinum, og fer serliga at snúgva seg um reinføri. Endmálið við hesum evni er at fáa sjúkradagarnar bæði hjá børnum og starvsfólki at minka munandi.

*sb.*

# Liðugt við dummum hundum í Føroyum

**Tað verða ikki júst hundakynstur, sum føroyskir hundar koma at luttaka í. Men nú verða í øllum førum tikin stig til stovnan av einum felag fyri hundar og eigarar tess. Og tað eru ikki hissinni møguleikar sum hetta kann geva í framtíðini**

HUNDALÍV
*Snorri Brend*



*Heðin Mortensen heilsar uppá Henrik Johansen frá Dansk Kennelklub. Hundurin sær út til at trívast væl teirra millum*

**Havn:** Framsýningar, har vakrasti hundurin skal finnast. Og eitt agility-show, har kynstur og kappingar fyri hundar eru í miðdeplinum.

Hetta kann gerast møguleikin í framtíðini, eydnast tað einum føroyskum eigarafelagi fyri hundar at fremja endamál síni í verki.

Í gjárkvøldi varð nevniliga hildin stovnandi fundur av einum felagi, hvørs endamál verður at verja áhugamálini hjá hesum ferføttu vinum okkara.

Endamálið hjá líknandi feløgum uttanlands - teim sonevndu Kennelklubbunum - er haraftrat, at eigararnir skulu fáa møguleika til undirvísing í hundavenjing, eins og arbeiðast skal fyri at útvega fríøki til hundarnar í kommununum.

Í Danmark eru skipað 11 umdømi av Dansk Kennelklub. Og felagið, sum varð stovnað í gjárkvøldið hevur so møguleika at gerast tað 12. umdømið.

Við á fundinum var Henrik Johansen frá danska felagnum. Við síni vitan á økinum ynskti hann at geva góð ráð til nevnd og limir.

Seinnapartin mánadagin nýtti hann eisini høvið at hitta borgarstjóran í Havn, Heðin Mortensen, sum eisini fegnaðist um at eitt slíkt felag sær dagsins ljós.

Kommunan hevur nevniliga lagt stóra orku í at halda býin reinan, og at fáa øki, sum serliga verða ætlað hundum og eigarum tess.

### Hundatalið í vøkstri

Eins og í øðrum londum so eru eisini føroyingar í størri og størri mun farnir at hava hund - ella hundar - sum húsdjór og sum frítíðarítriv.

Hetta upplivir ein dagliga, tá ein sær fólk ganga túrar við hundum sínum, sum eru av ymiskum slagi og í ymiskum støddum.

Hesir hundaeigarar vilja sjálvandi tað besta fyri hundar sínar, og at teir skulu fáa ta røkt, teir hava tørv á. Hesir ynskja tí eisini, at fáa tað nýggjasta at vita um hundar og hundahald.

Fleiri av hesum eigarum hava tí skrásett hundar sínar í ættarbókum hjá Dansk Kennelklub. Danska felagið hevur eisini seks limir í Føroyum, og sum eisini fáa sendandi limablaðið "Hunden".

Enn hevur kortini einki felag fyri hundaeigarar verið í Føroyum. Men nakað herfyri fekk danska felagið eina áheitan úr Føroyum um hjálp til at stovna eitt slíkt felag.

Hetta varð so, eftir ætlanini gjørt í gjárkvøldið. Ætlanin var at fáa valda ta fyrstu nevndina, sum so kann seta sær fyri at røkka endamáli felagsins.

### Framsýningar

Henrik Johansen hevur royndir á hesum økinum. Og fyri hann er tað av stórum týdningi at felagið fer at gera vart við seg og ætlanir sínar.

Í framtíðini verður tí ikki óhugsandi, at skipast kann fyri serstøkum venjingum og framsýningum við hundum.

Hinvegin verður so eisini gjørligt at skipa fyri undirhaldi við og fyri hundum. Í Norðursjællandi hevur danska felagið nevniliga tríggjar kvinnur, sum eru áhugaðar at koma til Føroyar at skipa fyri sonevndum agility-showum, sum ein ofta hevur sæð í sjónvarpinum.

Her sleppa hundarnir at royna seg í ymiskum hundakynstri og kappingum, har ein so at enda kann kjósa vinnandi hundin.

Hesar gentur hava allar royndir á økinum – ein teirra er heimsmeistari á økinum og ein onnur europameistari.

So fyri hundar og eigarar teirra er talan um eina spennandi framtíð við nýggja felagnum.

# Ómaksgjald í sparikassanum

**Suðuroyar Sparikassi fer nú at taka ómaksgjøld fyri flytingar og tænastur hjá kundunum**

PENINGASTOVNAR
*Snorri Brend*

- Frá 20. august í ár fer Suðuroyar Sparikassi undir at taka ómaksgjøld fyri flytingar og tænastur, skrivar sparikassin á heimasíðu síni.

Meginreglan í nýggja kostnaðarpolitikkinum hjá Suðuroyar Sparikassa er, at meiri sjálvsavgreiðsla merkir minni kostnað.

Innføringin av ómaksgjøldum merkir, at kundin rindar fyri tær tænastur, sum hann nýtir, og ikki sum í dag, har allir kundar rinda fyri tænasturnar hjá hvørjum øðrum.

- Avgerðin um at innføra ómaksgjøld er liður í dagliga arbeiðinum við at effektivisera og menna Suðuroyar Sparikassa, verður sagt.




*Suðuroyar Sparikassi fer nú eisini at seta í verk eina skipan við ómaksgjaldi*